# Undir húgvu

**Fyrstu pisurnar eru floygdar. Hesa vikuna fara húgvurnar at vera sjónligar kring landið**

STUDENTAR
*Heri á Rógvi*

Tað er altíð nakað serstakt hesar nógvu húgvarnar, sum hesa ársins tíð eru sjónligar í føroyska landslagnum. Pisurnar frá miðnámsskúlunum kring landið fáa eftir síðstu próvtøkuna eina húgvu setta á høvdið av læraranum.

Nakrar vikur áðrenn hava næmingarnir verið og tikið mát til húgvurnar, sum ikki hava langa livitíð og heldur ikki eru heilt bíligar, men sum eingin í dag vil vera fyriuttan.

Húgvan hevur ikki altíð verið so væl umtókt, og ymsu rákini hava sett sín dám, nær húgvan skuldi keypast ella ei.

Mánamorgunin varð eisini tosað um rák, men tað var í próvtøkuhølunum í Studentaskúlanum í Hoydølum. Onkur flokkur hevði føroyskt á skránni og onnur høvdu terpað í søgubókunum til síðstu próvtøkuna.

Mammurnar flokkaðust eisini um børnini við blómum á hesum serliga degnum. Eftir trý ára skúlagongd verður hesin dagurin mestur tann mest minniligi av øllum.

Ein teirra, sum fekk húgvuna á høvdið mánamorgunin, er 19 ára gamli Búi Árantsson úr Havn.

Amerikanska borgarakríggið fjaldi seg handan spurningin, Búi trekti. Tað gekk eisini óført, og karakterurin varð eitt níggju tal.

Og hetta er Búi væl nøgdur við. Sum heild hevur tað verið strævið at ganga til próvtøku, og serliga støddfrøðin hevur verið tung at hála seg ígjøgnum, sigur Búi.

Eitt enn betri skoðsmál – 11 – fekk hann í evning. Tað verður eisini hendan leiðin, sum Búi fer at fylgja. Eftir ætlan fer Búi til Århus at lesa listasøgu eftir summarfrítíðina.



*Búi Árantsson fekk sum ein av teimum fyrstu serligu húgvuna sum nýútbúgvin studentur í Hoydølum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

– Eg fari at sakna tey flokkinum, sigur Búi, sum hevur gingið í 3.Y ella 00.Y, sum tað eisini verður rópt.

Seks 3.S flokkar eru í Hoydølum. Tey fáa øll húgvurnar í vikuni, og hósdagin verður pisufundur á skránni.

Eisini á øðrum skúlum kring landið fáa tey í hesum døgum húgvur, soleiðis at allar húgvurnar fara at seta sín eyðkenda dám á ein stóran part av landinum – kanska ikki minst jóansøkuna.

Sosialurin ynskir øllum teimum undir húgvuni hjartaliga tillukku.









# Kunningarstovan í Vági opin

**Nú er tvær kunningarstovur í Suðuroynni, tí fríggjadagin var móttøka í nýggju kunningarstovuni í Vági, sum heldur til í Gamla Skúla**

KUNNING
*Dagfinn Olsen*

**Vágur:** Fríggjadagin sá nýggj kunningarstova dagsins ljós, tí móttøka var tá í nýggju kunningarstovuni í Vági, sum serliga skal taka sær av syðru helvt av Suðuroynni. Hildið verður til í gamla skúlanum við høvuðsvegin miðskeiðis í býnum.

Á Tvøroyri hevur kunningarstova verið, men fyrr í ár stovnaðu kommunurnar í Suðuroynni felagið Ferðavinnan í Suðuroy, ið er eitt átak fyri ferðavinnuna í oynni. At hava eina kunningarstovu í syðru helvt av oynni er eitt av endamálum felagsins.



*Heidi Kilgour er sett at taka sær av kunningarstovuni í Vági, sum er opin hvønn gerandisdag frá klokkan 9:00 til 16:00*

Kunningarstovan í Vági kemur at taka sær av vanligum kunningartstovu virksemi, t.d. skipa fyri tiltøkum og útferðum. Har er t.d. sluppin Johanna TG326 til at taka. Og so er eisini uppgávan at vera kunnandi hjá fólki á staðnum og vitjandi.

Heidi Kilgour er sett at taka sær av kunningarstovuni í Vági, sum er opin hvønn gerandisdag frá klokkan 9:00 til 16:00.

# Preben Frederiksen í Smiðjuni

FRAMSÝNING
*Páll Holm Johannesen*

Fríggjadagin byrjar framsýning hjá danska teknaranum og málaranum, Preben Frederiksen í Smiðjuni í Lítluvík. Framsýningin, sum eitur "Gensyn" vísur verk, sum lýsa føroysku náttúruna og mentanina.

Preben Frederiksen hevur fleiri ferðir áður vitja Føroyar, og hann sigur seg serliga fáa íblástur frá náttúruni og sjáldsomu mentanina í Føroyum. Danski listamaðurin arbeiðir naturalistisk, og hansara verk fevna bæði um oljumálningar og blýantstekningar. Preben Frederiksen er 56 ára gamal, og er útbúgvin á Jyske Kunstakademi í 1966.

Framsýningarnar byrja fríggjadagin klokkan 14.



*Danski listamaðurin, Preben Frederiksen, fer komandi vikuskiftið at sýna fram í Smiðjuni í Lítluvík. Á myndini sæst ein oljumálningur av Múla*

# Býráðið kannar Vágsbotn

**Á Tórshavnar Býráð vilja tey ikki nakað, fyrr enn kanningin av Vágsbotni er gjørd**

DÁLKING
*Páll Holm Johannesen*

Í samband við dálkingina í Vágsbotni í seinastu viku ætlar Tekniska deild at seta eina kanning í verk. Tað er komið í ljósmála, at meginparturin av dálkingini var húsarhaldsrusk, og tí er illgruni um, at møguliga kloakkskipanirnar hjá onkrum av matstovunum við Vágsbotn ikki hava virkað. Marius Müller á Teknisku deild vil hvørki vátta ella avsanna, at dálkingini stavar frá einum av matstovunum í umhvørvinum við Vágsbotn.



– Vit hava havt fund um málið, og komu ásamt um at seta eina kanning í verk, og áðrenn hon er gjørd kunnu vit ikki siga nakað um orsøkina. Mest umráðandi í løtuni er at finna fram, hvussu tilburðurin í seinastu viku hendi, og loysa trupulleikan alt fyri eitt, sigur Marius Müller á Teknisku deild á Býráðnum.

# Kikaratreff mikukvøldið

KIKARATREFF
*Páll Holm Johannesen*

Mikukvøldið skipar 3-arin í SMS fyri sokallaðum kikaratreffi umborð á Norðlýsinum. Eitt av starvsfólkunum í 3-arinum, Sára S. Sørensen, er í løtuni í fer við at skriva sveinauppgávuna.

Evnið í uppgávuni er kikarar, og í tí sambandi bjóðar 3-arin fólki ein ókeypis túr um Nólsoynna við Norðlýsinum. Á túrinum fer Sára Sørensen at greiða fólki frá um kikarar, og møguleiki verður eisini at royna nakrar av allarbestu kikarunum á marknaðinum.

Úr 3-arinum siga tey at loyst verður klokkan 20, og túrurin verður í einar 2-3 tímar. Umframt at fáa kunnleika um kikarar, so bjóðar 3-arin eisini fólki okkurt til matna.



*3-arin í SMS bjóðar mikukvøldið fólki til kikaratreff umborð á Norðlýsinum. Møguleiki verður hjá fólki at fáa hollan kunnleika um kikarar*

# Vítt um verøld

**Framsýningin av føroyskum frásagnum frá ferðum í útlondum verður opin alt summarið.**

FRAMSÝNING
*Páll Holm Johannesen*

Í summar skipar Føroya Landsbókasavn fyri framsýning av føroyskum frásagnum frá ferðum í útlondum. Talan er um tilfarð, sum føroyingar hava skrivað frá ferðum í útlondum, og sum hava staðið í tíðarritum og bløðum gjøgnum árini. Summarframsýningin lat upp fyri tveimum vikum síðan, og hon verður opin alt summarið.

Ferðafrásagnir sum bókmentasjangra er rættiliga gomul. Ferðafrásagnirnar hjá Marco Polo í Kina í 13. øld ella stóru rannsóknarferðirnar í 15. og 16.øld eru kendar um allan heim. Eisini eru fleiri ferðafrásagnir sum eru høvuðsevni í skaldsøgum. Vit kunnu nevna søgurnar um Gulliver, Jules Verne og ferðafrásagnir hjá Ernest Hemmingway.

Føroysku ferðasagnirnar eru skrivaðar í vanligum stíli. Sagt verður frá hendingum, og greitt verður frá, hvussu tey ferðandi síggja og upplíva ymisk viðurskiftið. Tey siga frá, hvat hugtekur og vekir undran ella andstygd.

Av rithøvundum, sum eru við á framsýningini kunnu nevnast, Sigert Patursson, K. O. Videro, Petur Háberg, Jakob Jakobsen og Gunnar Hoydal.